# Svenskir grandprix veteranar




B-i-g er ein svenskur poppbólkur, ið hevur spælt saman síðan miðskeiðis í 90´árunum. Teirra fyrsta stóra konsert var at hita upp á Scandinavium-Arena í Gøtuborg, tá ið heimskendi bólkurin dc Talk spældi har. Sama dag gav bólkurin sína fyrstu stakfløgu út, ið nevndist "Står På Berget".

Stakfløgan "Jag Ska Aldrig Lämna Dig", kom út ið sambandi við, at B-i-g luttók í svenska Eurovision Song contest í 1997. Lagið varð nógv spælt í svenskum útvarpi og endaði sum nr 3. í kappingini. Árið eftir royndi bólkurin seg aftur í Eurovision Song Contest, og gjørdist tá nr. 2.

So við og við kom bólkurin meir og meira fram í altjóða høpi og hevur spælt nógv á festivalum, rokkklubbum og samkomun í Týsklandi, Sveits, Russlandi, Eystlandi, Noreg, Danmark og Finlandi. Eisini hevur bólkurin verið á amerikonsku hittlistunum.

# Skotskur elektro-poppur

Skotski bólkurin Nightlight spælir eina blanding av elektropoppi og indi-rokki. Smakkiroyndir av fløguni „Until You Hear", ið kemur seinni í ár 2006, hava longu nú vakt áhugan hjá stórum plátufeløgum í USA. Sjálvir siga limirnir í bólkinum, at teirra tónlistarligu fyrimyndir eru bólkar sum Soulwax, The Police, Tree 63, Radiohead , Jethro Tull, Daft Punk og Abba. S

íðani bólkurin bleiv stovnaður hevur hann m.a spælt á ymiskum kristiligum tiltøkum, so nevndum „outreach events", á gøtuni, í skúlum og í fongslum. Limirnir siga, at endamálið við bólkinum er at boða gleðiboðskapin, at uppbyggja tey trúgvandi og at æra Gud.






PE